tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 2-2018 |
| Fundardagur | 5. februar 2018 kl. 17:00-17:20 og aftur frá 18:00-18:55 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Møtt: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Kristina Roest, Alvi Mortensen, Bjarni Hammer, Annika Pearce (tiltakslimur fyri Boga Johannesen) og Súsanna Bertholdsen

Skrivari: Henrik Weihe Joensen

## Yvirlit yvir mál til viðgerðar


| Pkt. | Tekstur | Síða |
|---|---|---|
| 1 | Samanbering av skattatølum - januar 2018 | 2 |
| 2 | Fyrispurningur, um Tvøroyrar kommuna hevur áhuga at keypa Roykstovuna | 3 |
| 3 | Val av øðrum nevndum og umboðum | 5 |




Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 2-2018 |
| Fundardagur | 5. februar 2018 kl. 17:00-17:20 og aftur frá 18:00-18:55 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**25.20.00-100-1-18**

## 1. Samanbering av skattatølum - januar 2018

### Avgerð

Býráðið tók kunningina frá borgarstjóranum til eftirtektar.

### Málsfrágreiðing

Áðrenn býráðsfundurin byrjaði, kunnaði borgarstjórin um, at Bogi Johannesen í telduposti hevði boða frá, at hann hevði forfall og at Annika Pearce er fyrstvaldi tiltakslimurin hjá Javnaðarflokkinum. Borgarstjórin segði, at hetta var eftirkannað og bjóðaði hann Anniku Pearce vælkomnan á fund.

Borgarstjórin kunnar um skattatølini fyri januar.

**Fíggjarnevndin, 1. februar 2018, pkt. 2:**
Fíggjarnevndin tók kunningina hjá borgarstjóranum til eftirtektar.

### Skjøl

- Samanbering av skatti 2017-2018.xlsx



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 2-2018 |
| Fundardagur | 5. februar 2018 kl. 17:00-17:20 og aftur frá 18:00-18:55 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**00.01.10-100-20-17**

## 2. Fyrispurningur, um Tvøroyrar kommuna hevur áhuga at keypa Roykstovuna

### Málsfrágreiðing

Anna Kirstin Thomsen spyr í teldubrævi, um Tvøroyrar kommuna hevur áhuga í at keypa søguligu sethúsini Roykstovan eisini nevnd faktorhúsini frá 1836, ið eru elstu hús á Tvøroyri, sí viðfestu skjøl við samskifti í málinum.

Býráðið saman við teknisku deild var og hugdi eftir roykstovuni 5. oktober 2017. Húsini eru í ringum standi. Økið er 1370 m2 stórt.

Sambært samtykt hjá Tvøroyrar býráð, bleiv boð uppá Roykstovuna áljóðandi kr. 400.000,- sent til advokatin hjá Annu Kirstin Thomsen, Fríðu Patursson, tann 31. oktober 2017. Av tí at einki frættist aftur frá advokatinum, bleiv ein uppfylgjandi fyrispurningur sendur 17. november 2017. Tá heldur einki aftursvar kom frá advokatinum tá, ringdi kommunustjórin til advokatin fríggjdagin 22. desember 2017. Telefoiniskt, upplýsti Fríða Patursson, advokatur, at hon hevði móttikið boðið uppá Roykstovuna frá Tvøroyrar kommunu, men at eigarin - Anna Kirstin Thomsen - ynskti ein hægri prís fyri húsini, sum er eitt stað millum kr. 400.000,- og kr. 700.000,-

Fríða Patursson upplýsti, at Skiftirætturin nú rykti eftir at fáa málið avgreitt, og tí bað undirritaði um, at Fríða Patursson sendi Tvøroyrar kommunu eina skrivliga kunning um niðurstøðu teirra viðvíkjandi boðnum á kr. 400.000,- frá Tvøroyrar kommunu áðrenn býráðsfundin 29. desember 2017.

Fríða Patursson, advokatur, vendi aftur til Tvøroyrar kommunu við teldubrævi tann 4. januar 2018, sí viðfesta teldubræv frá advokatinum og svarið frá kommunustjóranum í hesum sambandi.

**Býráðið, 11. september 2017, pkt. 1:**
Býráðið uttan Kristina Roest samtykti, at gerast skal ein teknisk meting av Roykstovuni. Í tí sambandi kontaktar kommunustjórin Onnu Kirstin Thomsen soleiðis at avtala verður ein skoðan av roykstovni, har tekniska deild luttekur saman við býráðslimum.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| Fundur nummar | 2-2018 |
|---|---|
| Fundardagur | 5. februar 2018 kl. 17:00-17:20 og aftur frá 18:00-18:55 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Býráðið, 9. oktober 2017, pkt. 10:**
Alvi Mortensen, formaður í teknisku nevnd, mælir til, at fara í samskifti við Fríðu Patursson, advokat, við tí í hyggju, at Tvøroyrar kommuna leggur eitt boð inn á roykstovuna/faktorhúsini. Boðið skal vera áljóðandi tað skuld, ið eigararnir hava upplýst fyri kommununi, t.e. áleið kr. 400.000,-

6. býráðslimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Bjarni Hammer, Bogi Johannesen og Súsanna Bertholdsen tóku undir við tilmælinum frá Alva Mortensen.

1. býráðslimur, Kristina Roest, tók ikki undir við tilmælinum hjá Alva Mortensen.

Tilmæli hjá Alva Mortensen fekk samtykt av býráðnum.

**Fíggjarnevndin, 29. desember 2017, pkt. 2:**
Fíggjarnevndin tók kunningina til eftirtektar og beinir málið til kunning í býráðnum.

**Býráðið, 29. december 2017, pkt. 3:**
Býráðið tók kunningina til eftirtektar, og samtykti, at rykkja Fríðu Patursson, advokat, og Onnu Kirstin Thomsen eftir einum skrivligum svari uppá boðið á kr. 400.000,- sum Tvøroyrar kommuna setti fram um Roykstovuna tann 31. oktober 2017.

**Býráðið, 31. januar 2018, pkt. 1:**
Býráðið bleiv kunnað og samtykti, at beina málið til viðgerð í teknisku nevnd, sum skal koma við tilmæli um eitt nýtt boð uppá Roykstovuna.

Býráðið ynskti, at Anna Kirstin Thomsen bleiv kunna hesum viðvíkjandi.

## Avgerð

Býráðið ynskti málið á afturlatnan fund, og beindi málið fyrst til viðgerð í teknisku nevnd og fíggjarnevndini, har fundir vórðu hildnir í dag.

## Skjøl

- Telefonnotat - samskifti við Annu Kirstin Thomsen



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 2-2018 |
| Fundardagur | 5. februar 2018 kl. 17:00-17:20 og aftur frá 18:00-18:55 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

- Svar til Onnu Kirstin Thomsen
- Fyrispurningur frá Annu Kirstin Thomsen
- Samskifti við Onnu Kirstin Thomsen
- Uppfylgjandi fyrispurningur til Fríðu Patursson, advokat
- Bræv við boðið sent Fríðu Patursson, advokati
- Bræv við boðið uppá Roykstovuna, matr.nr. 440a Froðba
- Samskifti við Fríðu Patursson, advokat
- Tilmæli til býráðið viðv. Thomsens hús

**00.01.10-A00-17-17**

## 3. Val av øðrum nevndum og umboðum

### Málsfrágreiðing

Valbólkur v/Súsannu Bertholdsen, Bjarna Hammer, Kristinu Roest og Boga Johannesen hevur sett fram ynski um sambært kommunustýrislógini kapittul 7, at Tvøroyrar býráð á fundinum í dag hevur val av øðrum nevndum og umboðum. Samskift hevur í hesum sambandi verið við kommunala eftirlitið, sí viðfestu skjøl í málinum.

Dags seinnapart tann 5. februar 2018 hevur borgarstjórin borið bræv til kommunustjóran, har borgarstjórin kunnar um, at hann er farin í valbólk saman við Anitu Vibergsdóttir og Alva Mortensen.

Talan er sostatt um tveir valbólkar í sambandi við býráðsfundin í dag - valbólkur A hevur 4 býráðslimir og valbólkur B hevur 3 býráðslimir.

Bogi Johannesen, býráðslimur, hevði forfall til fundin í dag, og tí er Annika Pearce kallað inn sum tiltakslimur til býráðsfundin í dag.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 2-2018 |
| Fundardagur | 5. februar 2018 kl. 17:00-17:20 og aftur frá 18:00-18:55 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Avgerð**

**Í aðrar nevndir og umboðan enn býráðsnevndir vórðu vald:**

Musikkskúlin í Suðuroy:

Valbólkur A: Uppskot til fastan lim er Eyðun Ásason og uppskot til varalim er Finnur Andreasen. Soleiðis samtykt.

Suðuroyar Ellis- og Røktarheim:

Valbólkur A: Uppskot til fastan lim er Bjarni Hammer og uppskot til varalim er Súsanna Bertholdsen. Soleiðis samtykt.

Snaran:

Valbólkur A: Uppskot er Súsanna Bertholdsen til fastan lim og Bjarna Hammer til varalim.
Valbólkur B: Anita Vibergsdóttir til fastan lim og Alvi Mortensen til varalim. Soleiðis samtykt.

Suðuroyar Ferðavinnufelag:

Valbólkur A: uppskot til fastan lim er Ebba Juulsgart og Anna Mortensen sum varalim. Soleiðis samtykt.

Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn:

Valbólkur A: uppskot er somu umboð - Kári Jespersen sum fastan lim og Chris Jan Michelsen sum varalim. Soleiðis samtykt.

Tilbúgvingarnevndin:

Borgarstjórin er føddur formaður. Valbólkur A: uppskot eru Bjarni Hammer og Alvi Mortensen sum fastir limir. Varalimir eru Kristina Roest hjá Bjarna og Anita Vibergsdóttir hjá Alva. Soleiðis samtykt. Hini umboðini í tilbúgvingarnevndini eru tey somu - tað vil siga umboð fyri Hvalbiar kommunu, politiið, tilbúgvingarleiðaran í Tvøroyrar kommunu og bjargingarfelagið í Hvalba (SNB).



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 2-2018 |
| Fundardagur | 5. februar 2018 kl. 17:00-17:20 og aftur frá 18:00-18:55 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Skúlastýrið:

Uppskot frá valbólki A: Bogi Johannesen sum fastan lim og Bjarni Hammer sum varalim. Valbólkur B: Anita Vibergsdóttir sum fastan lim og Kristin Michelsen sum varalim. Soleiðis samtykt.

IRF:

Valbólkur A: uppskot til fastan lim er Kristina Roest og varalimur er Bogi Johannesen. Soleiðis samtykt.

SEV:

Valbólkur A: uppskot til fastan lim er Bogi Johannesen og varalimur er Súsanna Bertholdsen. Soleiðis samtykt.

Ferðslunevndin:

Somu limir sum í teknisku nevnd umframt umboð fyri politiið við varalimi. Valbólkur A: uppskot til fastan lim er Áki Dimon og varalimur er Róland Joensen Soleiðis samtykt.

Suðuroyar Barnaverndartænasta:

Valbólkur A: uppskot til fastan lim er Súsanna Bertholdsen og borgarstjórin er varalimur. Soleiðis samtykt.

Suðuroyar Bú- og Heimatænasta:

Borgarstjórin er føddur limur, Anita Vibergsdóttir er varalimur. Valbólkur A: uppskot til fastan lim er Súsanna Bertholdsen og varalimur er Bogi Johannesen. Soleiðis samtykt.

Bygginevndin til útbygging av barnagarðinum:

Býráðið er samt um, at sama nevnd heldur fram.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 2-2018 |
| Fundardagur | 5. februar 2018 kl. 17:00-17:20 og aftur frá 18:00-18:55 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Skjøl**

- Svar til Bjarna Hammer, býráðslim, í.s.v. umbøn um manglandi skjøl
- Svar til Súsannu Bertholdsen í.s.v. umbøn um val av øðrum nevndum
- Móttøkuváttan frá kommunustjóranum
- Svar frá kommunala eftirlitinum
- Tveir fyrispurningar til kommunala eftirlitið
- Kunning frá borgarstjóranum um viðkomandi skjøl í málinum
- Móttøkuváttan í.s.v. uppfylgjandi svar frá kommunala eftirlitinum



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 2-2018 |
| Fundardagur | 5. februar 2018 kl. 17:00-17:20 og aftur frá 18:00-18:55 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Bók lisin Fundur lokin kl. 18:55**

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Kristina Roest

Alvi Mortensen

Bjarni Hammer

Annika Pearce

Súsanna Bertholdsen



Formansváttan

tlf 371086
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 60
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 2-2018 |
| Fundardagur | 5. februar 2018 kl. 17:00-17:20 og aftur frá 18:00-18:55 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |



Formansváttan